**NØVN Í VIKUNI**

# Alexandra á Dul deyð



Leygardagin 15. februar andaðist Alexandra á Dul í Klaksvík, 86 ára gomul. Hon var var fødd 5. august 1916, dóttir Sáru og Jens Clæmint Isaksen. Alexandra var fødd og uppvaksin í Klaksvík.

Í 1939 fór hon á húsarhaldsskúla í Danmark, og tvey ár seinni giftist hon í Keypmannahavn við Páll á Dul. Tey vóru millum tey mongu, ið ikki sluppu heimaftur, tá kríggið brast á.

Saman við manni sínum hevur Alexandra verið samkomuni í Betesda ein hollur stuðul. Í nógv ár var hon vertur hjá teimum mongu útlendsku trúboðarunum, sum gjøgnum árini komu at vitja samkomuna.

Alexandra og Páll fingu børnini Sáru, Agnar og Maritu.

**r.s.**

# Regin Olsen 70

Í dag, 4. mars, fyllir Regin Olsen í Havn sjeyti. Regin er sonur Armgarð, f. Egholm, og Napoleon (kallaður Bona) Olsen, bakarameistara hjá Frants.

Regin gekk í skúla og tók millumskúlaprógv í Havn. Longu sum 16 ára gamal fór hann at arbeiða í Sjóvinnubankanum, og bankamaður var hann í mong ár.

Í 1955 sendi táverandi stjórin í Sjóvinnubankanum, Rasmus Olsen, tann tá bert 21 ára gamla Regin til Klaksvíkar at vera leiðara í tí nýstovnaða Norðoya Banka, sum var Norðoya deildin av Sjóvinnubankanum. Tað starvið røkti hann, til Rasmus í 1964 sendi boð eftir honum at koma aftur til Havnar, har hann gjørdist fulltrúi í bankanum. Í 1976 tók hann við sum bankastjóri saman við Steingrími Nielsen, eftir at Rasmus Olsen hevði lagt frá sær. Tað starvið røkti hann til 1990, tá hann segði seg úr starvi.

Hann legði tó ikki árarnar inn, men tók við sum stjóri í Marr & Co, umframt at hann hevur havt fleiri nevndarstørv, eitt nú í Landsbankanum, Ídnaðargrunninum, á Norðis á Eiði og í Vaðhorn. Hann er framvegis virkin í trimum teimum seinastu.

Regin hevur mangt ítriv. Eitt er at fara á flot. Hann er góður miðamaður, serliga í Nólsoyarfirði og her um leiðir. Hann er bara einaferð komin aftur ongul í reyv, og tað var tá hann royndi seg sum útróðrarmann saman við sváginum Finnboga Ísakson.



Eisini er maðurin fittur í hondunum. Í kjallaranum hevur hann lítlan verkstað, har hann hugnar sær við at gera grindaknívar, prýðislutir, rammur og útskeringar. Tann, sum fer inn á gólvið, sær mangt av slíkum. Og abbabørnini hava fingið mangan lutin, sum teimum dámar væl og fer at dáma betur, sum árini líða.

Í Klaksvík rann saman millum Ruth Isaksen og Regin. Tey giftust valdagin 8. november 1958 og eiga trý børn: Jákup Napoleon, sum er giftur við Dorrit á Fløtum. Anniku, sum er gift við Niels Winther Poulsen. Og Armgarð, sum er gift við Oyvindi Brimnes. Ruth og Regin eiga átta ommu- og abbabørn og tað níggjunda er í nánd.

Føðingardagin er Regin burturstaddur.

# Føroya Postfelag nýggjar nevndarlimir

Leygardagin 22. februar hevði Føroya Postfelag sín árliga aðalfund í B36 húsinum. Helst eru tað samráðingarnar, ið verða í heyst, sum skaptu stóra áhugan. 110 limir møttu til fundin.

Nógv mál vórðu á skránni. Millum málini ið høvdu størst áhuga, var nýggja lønarskipanin, sum felagið hevur sett sær fyri at avgreiða við komandi samráðingar, og tær stóru broytingarnar fyri Postverkið og starvsfólkið sum liggja fyri framman.



*Hendrik Thomsen*



*Johannes A. Ellingsgaard*

Fyri vali stóðu Jákup Páll M.Mortensen, Agnar Bech og Elin Danielsen. Jákup Páll var afturvaldur, meðan Agnar Bech og Elin Danielsen tóku ikki við afturvali. Fyri tey vóru vóru valdir Johannes A. Ellingsgaard og Hendrik Thomsen. Nýggja nevndin hevur nú skipað seg og sær hon soleiðis út: Sunleiv Højgaard, formaður, Hendrik Thomsen, næstformaður, Finngerð Hansdóttir, kassameistari, Jákup Páll M. Mortensen og Johannes A. Ellingsgaard.

# Katrin Petersen mentanarleiðari í SvF



1. mars tók Katrin Petersen við sum virkandi leiðari á mentanardeildini hjá Sjónvarpi Føroya. Katrin er útbúgvin journalist við journalistháskúlan í Århus við starvsvenjing á Dimmalætting. Seinastu 3 árini hevur hon starvast hjá SVF.

# Ronnie Midjord 30 ár á Suðuroyar Sjúkrahúsi



Leygardagin, 1. mars, hevði Ronnie Midjord, umsjónarmaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, 30 ára starvsdag. Ronnie er føddur og uppvaksin á Tvøroyri. Hann er útbúgvin skrivstovumaður. Hann lærdi á Suðuroyar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum. Síðan 1986 hevur hann verið umsjónarmaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Ronnie er giftur við Tinu, f. Niclasen, og eiga tey børnini Egil og Ingun.

# Sjúrður Ferjá farin frá sum lærari



Fyrstilærarin við Hvalvíkar Skúla, Sjúrður Ferjá, er farin frá sum lærari. Sjúrður, sum í dag er 62 ára gamal, er føddur og uppvaksin við Gjógv. Hann er sonur Jógvan Sofus Ferjá, f. Joensen, og Kristinu Sofíu, f. Christiansen, bæði frá Gjógv. Sjúrður er giftur við Marjun, f. Kollslíð, av Eiði. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1962. Eftir tað var hann lærari í Fuglafirði frá 1962-66. Síðan 1966 hevur hann verið lærari við Hvalvíkar Skúla. Hann hevur eisini tikið skeið í føroyskum á Fróðskaparsetri Føroya. Frá 1. januar 1977 til 31. desember 1984 sat hann í Hvalvíkar bygdarráð, tey fyrstu fýra árini sum formaður. Sjúrður hevur týtt barnabókina "Víki víkingur" eftir Runar Jonsson.

# Tórshavnar Bátafelag 5 ár

Fríggjadagin 28. februar hátíðarhelt Tórshavnar Bátafelag, at felagið var vorðið 5 ár. Í hesum sambandi var móttøka frá kl. 16 – 19 í felagshølunum í Vágsbotni, har nógv fólk møttu. Stigtakarar til felagið vóru Øssur Hjalt, Kartni Olsen og Heðin Ólavson. Formaður felagsins er Kartni Olsen, Øssur Hjalt er næstformaður, kassameistari er Alvi Nielsen, hinir í nevndini eru Páll Klein og Erhard Mortensen. Felagið hevur í dag næstan 600 limir. Felagshølini eru opin mánakvøld, mikukvøld og leygardag fyrrapart.



*Nevndin í Bátafelagnum: F.v. Alvi Nielsen, Páll Klein, Øssur Hjalt og Kartni Olsen. Erhard Mortensen vantar á myndini*



# 300 grýlur í Argja skúla



**Í gjár var føstalávintsmánadagur og varð tað hátíðarhildið á skúlunum kring landið. Í skúlanum á Argjum varð eisini nógv gjørt burturúr, og mánamorgunin kundu argjafólk síggja eini 300 grýluklødd børn og vaksin ganga túr áðrenn tey fóru oman aftur í skúlan at sláa tunnu**

FØSTALÁVINT
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Føstalávintsmánadagur var í gjár, og hetta varð eisini hátíðarhildið á rættan hátt á skúlunum kring landið. Á Argjum vóru eini 300 grýluklødd børn og vaksin farin at ganga túr mánamorgunin. Soleiðis fingu øll argjafólk høvi at síggja allar tær stásiligur grýlurnar henda morgunin.

Aftaná gongutúrin savnaðust allar grýlurnar á skúlanum. Har vórðu tey stillað upp í flokkum, og síðani dansaðu tey føroyskan dans. Áðrenn kattakongarnir skuldu finnast, fingu børnini okkurt leskiligt frá skúlanum.

Nærum allir næmingarnir vóru í grýluklæðum, og fleiri av lærarunum eisini. Har vóru brúðrar, gamlir menn við stórum búki, Batman, Spiderman, Pippi, ein fartelefon, ein pylsa við pylsubreyði, Superman, Snjóhvíta, firvaldar og nógv, nógv annað. Hugflogið hevði veruliga verið í gongd hjá teimum ymsu.

Lagið var ógvuliga gott, og hugnaðu børn og lærarar sær óført. Sjálvt um veðrið ikki var av tí allarbesta, so skuldu tunnurnar nokk fáast av vegnum – tað søgdu børnini í øllum førum.





